Mettu 6,4 milliónir við síðuna av

LIST. Ein málningur af J.C. Dahl var seldur fyri 52.000 krónur í fjør. Mikukvøldið var sami málningur seldur fyri 6,5 milliónir krónur

Listauppboðssølan Crafoord, Nellemann & Thomsen hevur gjørt eitt risamistak, og kann nú vænta sær eitt stórt endurgjaldskrav.

Í fjør seldi fyritøkan í Århus ein málning eftir J.C. Dahl fyri 52.000 krónur. Tað var eingin, sum legði merki til, at málningurin var signeraður í 1817, og tí fór málningurin fyri ein brotpart av tí, sum hann í roynd og veru var verdur.

Hetta varð staðfest á einum uppboði í Keypmannahavn mikukvøldið, tá sami málningurin varð seldur fyri 6,5 milliónir krónur. Síðani uppboðið í Århus er málninguri, sum verður nevndur »Frederiksborg Slot í mánalýsi« reinsaður, og undan søluni mikukvøldið varð hann mettur til at hava eitt virði upp á millum fimm og seks milliónir krónur.

Tey, sum av fyrstn tíð seldu málningin, kenna seg illa viðfarin, og tey fara helst at krevja endurgjald frá Listauppsøluni í Århus.

Tvey onnur listarverk fóru fyri milliónaupphæddir á uppboðssøluni, sum var í Ellekilde Auktionshus. Ein málningur hjá P.S. Krøyers fór fyri 6,5 milliónir krónur, og eitt verk hjá Pablo Picasso fór fyri 6,2 milliónir.

Norðmenn stríðast við deyðsbakteriu

SJÚKA. Higartil í ár eru 9 fólk deyða av eini kjøtetandi bakteriu, sum ger serliga nógv um seg í Noregi

Ein kjøtetandi bakteria ger nógv um seg í Noregi, har 9 fólk higartil eru deyð av bakteriuni, og eini 108 eru vorðin álvarsliga sjúk.

Talan er um eina bakteriu, sum serliga ger um seg í Noregi, tá menningarlondini ikki verða roknað við. Hóast nógv eru vorðin sjúk av bakteriuni, sum verður rópt ein deyðsbakteria, er tilburðirnir minkandi. Hesa tíðina í fjør vóru 175 blivin sjúk, skrivar norska blaðið VG.

Síðani miðskeiðis í 80'unum hevur talið á norðmonnum, sum eru deyðir av bakteriuni, verið javnt. Flest doyðu í 1998, tá 39 fólk doyðu av deyðsbakteriuni, og 267 fólk gjørdust sjúk av henni. Í fjør doyðu eins nógv, men tað gjørdu nakað færri álvarsliga sjúk.

Tey, sum verða álvarsliga sjúk, mugu ofta amputera armar, bein ella aðrar kropslutir, tí bakterian hevur fingið fastatøkur á teimum. Vanliga sjúkaeyðkenni er tó blóðeitran.

Kvinnur verða raktar, meðan tær eiga børn

Fjórða hvør kvinna, sum verður rakt av bakteriuni, verður rakt í undirlívið, og nógv av hesum verða smittað, tá tey eiga børn. Fleiri kvinnur eru deyðar, meðan tær hava átt børn, og børn eru eisini deyð, áðrenn ella undir føðingini orsaka av bakteriuni.

Viðgerð við antibiotika riggar bert, um fólk gerast varug við sjúkuna beinanvegin. Hevur bakterian fingið fastatøkur, er trupult at fáa bilbukt við henni. Tí er tíðin so avgerandi, um fólk skulu sleppa uttan álvarslig árin, tá tey eru smittað við bakteriuni.

Seinastu 10 árini eru møguleikarnir at yvirliva bakteriuna vorðnir størri. í 1988 doyðu 30% av teimum, sum vórðu smittað, meðan talið í dag er 15%.

Eingin kennir orsøkina til, at færri doyggja av bakteriuni, men læknar vóna, at tað er tí, at fólk skjótari gerast varug við sjúka og tí koma í viðgerð beinanvegin.

Telduspøl og harðligir filmar eru í mesta lagi ein viðvirkandi orsøk til, at børn fremja harðskap. Ofta eru tað fleiri ymisk sosial viðurskifti sum gera, at børn fara um markið. Mynd: Jens Kristian Vang

Framhald av forsíðuni

avbjóðingin í at klára teir ymsu partarnar av spælinum, at koma víðari og at yvirliva.

- Harafturat eru harðskapurin í telduspølunum hvørki útpenslaður, drúgvur ella nærgangandi. Harðligu hendingarnar eru eisini animeraðar, og tað ger tær minni veruligar, skrivar Birgir Kruse í ritgerðini.

Avbjóðingin er lokkandi

Tað eru ikki blóðugar ella harðligar hendingar í telduspølunum sum gera, at børnini hava hug at spæla telduspølini. Heldur er tað spenningurin og møguleikin at duga spælið betur, sum ger at tey spæla.

Tað eru serliga dreingir, sum hava hug at spæla harðlig spøl. Genturnar royna eisini hesi spøl, men tað eru dreingirnir, sum halda fram at spæla tey.

Børnini sjálvi uppliva, at filmar tykjast vera harðligari enn telduspøl. Telduspølini eru bara spæl, meðan í filminum verður roynt at gera hendingarnar so veruligar sum gjørligt. Hetta ger, at filmarnir kennast meira ræðandi enn telduspøl.

- Harðskapur á filmi ella í telduspølum kann vera ein viðvirkandi orsøk, tá børn fremja harðskap, men orsøkin er altíð at finna í ymiskum sosialum viðurskiftum, skrivar Birgir Kruse í ritgerðini.

UNESCO hevur ein upplýsingarmiðdepil um børn og miðlaharðskap í Gøteborg, og hesin stovnur hevur roynt at samskipa granskingina av børnum og miðlaharðskapi. Fyrsta ársfrágreiðingin, sum kom frá hesum stovni fyrrárið, staðfestir, at harðskapur í miðlunum bara kann metast sum ein møgulig orsøk út av nógvum, tá børn fremja harðskap.

Tað eru trupult at granska í hesum viðurskiftum, tí tað ber ikki til at isolera ávirkanina, sum miðlaharðskapur hevur á børnini, frá øllum øðrum sosialum ávirkanum, men kanningarnar á økinum peika flest allar sama veg. Tað ber ikki til bara at geva telduspølum ella filmum skuldina, tá børn fremja harðskap.

Leikluturin hjá fjølmiðlunum

Í kjalarvørrinum av skottilburðinum í Klaksvík fyri tveimum vikum síðani leitaðu fjølmiðlarnir eftir eini frágreiðing um, hví ógvusligu hendingarnar fóru fram. Eitt av boð var, at harðlig telduspøl høvdu fingið dreingirnar at skjóta við skørpum eftir fólki.

Sambært ritgerðini hjá Birgiri Kruse er hetta typiskt fyri fjølmiðlarnar, og hann kallar fyribrigdi fjølmiðlapanikkur.

Eitt dømi, sum verður tikið fram um hetta fyribrigdi, er ein blaðyvirskrift, sum er: "Maður dripin meðan hann lurtaði eftir heavy-rock tónleiki".

Yvirskriftin er helst spennandi og lokkandi fyri lesaran, men tað vísti seg, at maðurin, sum var ein friðarligur hampamaður, hevði lurtað eftir tónleiki í einum walkmanni, tá hann gekk tvørtur um eina jarnbreyt. O ongar ávaringar vóru um jarnbreytina, og maðurin varð raktur av einum toki. Á einum av bondunum var tónleikur hjá Ozzy Ozbourne, og hetta fekk blaðið at koma við yvirskriftini, sum skapti øsing um harða rocktónleikin.

Sambært ritgerðini hjá Birgiri Kruse eru tað tvær týðandi orsøkir til fjølmiðlapanikkin.

Onnur er, at tað fer fram ein mentanarbardagi millum gomlu miðlarnar og teir nýggju, sum ofta spreiða seg skjótt. Tann etblerada mentanarelitan verður undirgrivin, tá til dømis popptónleikur, sjónvarp, filmur ella telduspøl fáa vind í seglini.

Hin orsøkin er ein ættarliðsbardagi, og tað er eyðsýnt, at kjakið um miðlaharðskapin altíð fer fram millum vaksin vegna børnini. Samstundis eru børnini upptikin av teimum nýggju miðlunum og fáa stóran kunnleika til teir. Hesi eru síðani ein hóttan móti teimum vaksnu og teirra valdið yvir mentanini og ikki minst skúlanum.

Lata vera við at fordøma

Birgir Kruse skrivar í niðurstøðuni í ritgerðini, at skúlin hevði blivið enn betri, um hann ikki bara vrakaði og útstoytti tann part av mentanini, sum børn og ungfólk brúka.

Hann heldur, at skúlin hevði verið betri tæntur við ikki at fortelja hesum børnum, at tey gerast býtt av at brúka teir ymsu miðlarnar sum til dømis teldur og telduspøl, og sum børnini sjálvi hava stóra fragd av. Skúlin skal heldur royna at skilja hesa sermentan og tann leiklut, sum hon spælir.

- Heldur enn at stríðast ímóti miðlaharðskapinum, tí hann verður sagdur at verða skaðiligur, skuldi skúlin heldur brúkt orku upp á at fingið bilbukt við veruligar sosialar trupulleikar, skrivar Birgir Kruse í ritgerðini.

Δ

2 arin **Tíðindablaðið Sosialurin. Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720. **Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein. **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.

Rýma úr reiðrinum

Nú flúgva Náttarravnarnir avstað til nýggjar avbjóðingar. Sendingin, sum hevur verið á skránni leygarkvøld seinastu átta árini, verður send fyri seinastu ferð í kvøld Mynd: Álvur Haraldsen

ÚTVARP. Eftir átta vetrar á rað við Náttarravnum í útvarpinum, verður sendingin send fyri seinastu ferð í kvøld

Fróði Løkságarð

Á midnátt, tá Høgni Djurhuus á sín egna sermerkta hátt hevur drigið saman um vikuna sum fer, er tað fyri seinastu ferð. Eftir átta vetrar við Náttarravnum á skránni, verður sent fyri seinastu ferð í kvøld.

– Tíðin er um at fara frá hesum konseptinum, sigur Rúni Jákupsson, sum saman við Heðini Arge er vertur í sedingini, og báðir eru teir samdir um, at teir hava fingið so nógv burtur úr konseptinum, sum tað nú einaferð kann lata seg gera.

– Tað hevði verið rætt at givist seinasta ár, men tá vit nú byrjaðu aftur eftir summarsteðgin, vóru vit noyddir at senda ein heilan vetur, sigur Heðin, sum líka síðan byrjanina hevur verið annar av verturnum í Náttarravnum. Tey seinastu trý árini saman við Rúna.

Báðir eru teir tó samdir um, at einki er í vegin fyri at halda fram við sendingini í fleiri ár afturat, við einari ávísari undirtøku, men so høvdu tað eisini verið allsamt fleiri fólk, ið grenjaðu um sendingina. Teir eru tí samdir um, at nú er rætta løtan at gevast.

Troyttir av sendingini

Tá Náttarravnar byrjaðu fyri átta árum síðani var hetta nakað heilt nýtt í útvarpssamanhangi. Eingin sending hevði áður verið á skránni so seint leygarkvøld, og heldur ikki var nakað roynt fyrr, ið líktist júst hesum.

Tað vóru teir báðir Heðin Arge og Birgir Kruse, sum byrjaðu sendingina. Sendingin fekk heilt frá byrjan góða undirtøku, og serliga vísti tað seg at vera spurnarkappingin, sum hevði stóran áhuga ímillum fólk, og ofta var talan um rættuligan telefonstorm.

– Nú er tað ikki heilt tað sama, sigur Heðin. Spurnarkappingar eru at finna í nærum hvørjari sending bæði í útvarpinum og á Rás 2, so tey flestu hugskotini vit høvdu til Náttarravnar eru nú endurnýtt at øðrum, so tey eru ikki so spennandi longur.

Vertirnir viðganga eisini at hugurin teir seinastu mánaðarnar ikki hevur verið tann sami sum fyrr, og teir fyri tað mesta hava sað fram til at at vetrarskráin skuldi enda. Longu áðrenn summarstegðin seinasta ár, vóru teir vorðnir troyttir, men eftir nakrar væleydnaðar Studio 4-sendingar um summarið, høvdu teir fingið sannført hvønn annan um, at teir høvdu hug til at royna ein vetur afturat í Náttarravnum.

– Nú er tað komið hartil, at einki fær okkum at halda fram, um vit fingu bjóðað tað dupulta í løn, so hevði avgerðin um at halda uppat verið endalig, eru teir báðir samdir um. Báðir vísa teir eisini á, at tað í longdini verður keðiligt at vera bundin hvønn leygardag og leygarkvøld í átta mánaðar av árinum. Tá er neyðugt, at tú veruliga brennir fyri sakini.

Endabrestur

Tað verður tó ein ordiligur endabrestur í Náttarravnum í kvøld.

Nógv spennandi verður á skránni, millum annað hevur tónleikabólkurin Taxi ein týðandi leiklut í sendingini. Teir fara millum annað at spæla nøkur av eyðkennisløgunum, sum verða brúkt í sendingini, júst sum vanligt er at sígggja í undirhaldssendingum í sjónvarpinum, umframt at teir eisini fara at spæla nøkur av lurtarynskinum í Beatbox. Ein listi verður lagdur út á heimasíðuna hjá Náttarravnum, har tey, sum skriva inn til sendingina, kunnu velja sær eitt lag.

Saman við sengingini teir sendu beinleiðis av Norðoyastevnu seinasta ár, er hetta ein tann tekniskt mest krevjandi sendingin, teir hava gjørt,

– Vit vera noyddir at senda úr útvarpshøllini fyri at vit kunnu fáa pláss fyri Taxi.Tað er uttan iva nógv, sum kann ganga galið, men tað ger bara tað heila nógv meiri spennandi.

– Hetta er nakað, sum vit hava havt hug til at gera leingi, og tá tað so eydnaðist okkum at fáa Taxi at luttaka eisini, var hetta nakað sum bara mátti roynast. Og so er hetta eisini at enda við einum ordiligum braki.

Tá kvøldið í kvøld er fingið afturum, ætla teir báðir náttarravnarnir rættuliga at taka sær av løttum.

– Timingin er perfekt, EM í fótbólti byrjar nú, so har verður góður møguleiki at fylgja væl við, sigur Rúni, sum við góðari hjálp frá myndamanninum hjá Sosialinum, eisini hevur roynt at sannføra Heðin um, at teir svørtu og hvítu úr Havn fara at draga longsta stráðið í heimligu kappingini.

Sjálvt um teir báðir, Heðin og Rúni, ikki hava ætlanir um at gera nakað við útvarpsarbeiði í summar, so lova teir, at teir at verða aftur á skránni komandi vetur, tað verður bara ikki leygarkvøld, og sendingin fer ikki at eita Náttarravnar.

– Hatta kanst tú gott skriva, so hanga bæði vit og leiðslan upp á tað.